# Skopunar Kommuna

**Telefon 361349 – t-postur: skopun@skopun.fo – Tormansvegur 12, 240 Skopun**



**Skopun tann 31.12.2025**

Á ársins síðsta degi, er góður møguleiki at líta aftur á avgerðir og hendingar, sum eru farnar fram í brátt farna árið.

Hetta er fyrsta árið av fýra ára langa skeiðinum, sum vit eru vald at sita. Sum øllum kunnugt, er útskifting í formansskapinum, sum hevur gjørt hetta fyrsta árið til eitt sokallað royndarár.

Lyftini og ætlanirnar til valið vóru nógvar, og vit eru komin ávegis við nøkrum av teimum. Nógv gott er gjørt í kommununi í gjøgnum árini, men tó kunnu vit ikki leggja arbeiðshandskarnar frá okkum. Tað krevur, at halda fram við góða arbeiðinum, ið er gjørt, tað krevur at halda nógv við líka og ikki minst at hyggja frameftir. Orðatakið ”Rom bleiv ikki bygt eftir einum degi”, kemur ikki av ongum.

Nakrar av avgerðinum, ið eru tiknar í ár, eru m.a at matarskipan bleiv sett í verk í barnagarðinum. Hetta hava foreldur og starvsfólk verið sera glað fyri. Hetta førdi tó við sær, at barnagarðsgjøldini hækkaðu 270 kr. Gjøldini er nú hesi: Vøggustovugjaldið 1550 kr. og barnagarðsgjaldið 1450 kr. Frítíðarskúlagjaldið er tað sama, 800 kr.
Fyri fáum árum síðani gjørdi Skopunar kommuna eitt nýtt spælipláss í skúlanum, har helvtin av økinum bleiv lagt undir gummi. Ætlanin var, at alt økið skuldi undir gummi, men kostnaðurin var alt ov høgur. Vit hava funnið eina góða loysn nú, vit hava lagt graslíki á restina av økinum. Hetta er við til, at betra um umstøðurnar á spæliplássinum og at viðlíkhalda spæliplássið, so skervur o.a. ikki slítur uppá gummiundirlendi.
Íshús á keiini er gjørt, sum betrar um umstøðurnar hjá teimum ið m.a. fáast við at rógva út.

Vit hava verið í samband við ferðslusamskipara, ið hevur gjørt eina ætlan, ið vísir á ymisk viðurskifti sum vit kunnu betra um, fyri at gera tað tryggari hjá bæði fólki til gongu og akførum, í ferðsluni í Skopun. Har var samskiparin m.a. og tosaði við

børnini í skúlanum, fyri at fáa teirra sjónarmið. Løgreglan góðtók hesa ætlan nú í desembur, so nú er enduliga klárt at fara undir átøkini. Nøkur av átøkunum eru at gera bungur og at bygdin verður gjørd til eina 30 km/t sonu.

Átakið Closed for Maintinens var fyrsta vikuskiftið í mai. 12 fólk úr ymiskum londum komu til Skopunar at gera fyrstu lendisgøtuna, sum skal ganga framvið Norðaravatnið. Veðrið varð ikki av tí besta, hetta darvaði arbeiðinum nakað, men gøtan kom oman til vatnið.
Visit Skopun hevur søkt um, at verða við í CFM aftur í 2026. Vit vóna at sleppa við aftur, so arbeiðið kann halda fram.

Ein stór íløga er gjørd í ár, tað er vøllurin inni í Dal, sum bleiv skiftur fyrr í ár. Hetta var ein neyðug íløga, sum allir partar eru glaðir fyri bleiv gjørd. Tað er Sandoyar Skúlasamband sum umsitur vøllin, og parturin hjá Skopunar kommunu var uml. 1.400.000 mió kr.
Ung í arbeiði var í tvær vikur í summar, og kom fitt burtur úr. M.a. blivu trøð plantað og eitt økið bleiv gjørt í kommunugarðurin í Gerðinum, har møguleika er at seta seg niður eina løtu. Og børnini hava møguleika at reiggja og spæla í garðinum. Bonkurin í garðinum er keyptur frá Alzheimerfelagnum.

Skopunar Kommuna hevur fingið heimasíðu. Hettar var tiltrongt, og flytur kommununa fram á leið á talgilda økinum. Heimasíðan verður dagførd so líðandi, og vit arbeiða við at fáa gjørt góðar vegleiðingar til m.a. tá man søkir um byggiloyvi.

Av tiltøkum, sum kommunan/Visit Skopun hevur verið við til í ár kunnu m.a. nevnast kassabilakappkoyringin, Stuttleikadagur við Norðaravatn, Merkisdagar og nú í desembur hava vit m.a. havt jólakonsert. Árliga nýggjárshaldið hjá Skopunar Kommunu sum á hvørjum árið er væl umtókt, mátti tíverri víkja fyri veðrinum í ár. Meira kunning kemur seinni, nær nýggjárshaldið verður.

Hetta er nakað av tí, ið er gjørt í árinum. Tað eru nógvar smærru uppgávur, sum ikki altíð síggjast so væl. Tað er nógv viðlíkahald at gera í einari bygd, bæði av bygningum, vegum, vatn- og kloakkleiðingum v.m.

Skjøtil er settur á ymisk arbeiði, sum ikki kemur í gildi fyrrenn í komandi ári. M.a at kortleggja bygdina, so at allar leiðingar verða skjalfestar. Vit arbeiða eisini við, at kommunan skal koma á Vangan.
Gjøldini fyri skúranar á keiini hækka 1. jan við 50 kr. Ein lítil skúrur fer nú at kosta 200 kr/mðr. og ein stórur fer at kosta 300 kr/mðr. Teymagjaldið er broytt frá at vera 1500 kr um árið til, at man skal gjalda 100 kr. pr 10 cm báturin er breiður, men í minsta lagi 1500 kr.

Vit hava fingið gjørt eina ljóðkanning í skúlanum, sum vísir at ljóð viðurskiftini ikki eru nøktandi, vit hava sett 300.000 kr av til at skifta loftið í skúlanum í summar. Eisini hava vit sett 250.000 kr. av til at fáa gjørt nýggjan postkassa. Postkassin bleiv tikin niður í august mánaði, og var í sera ringum standi.

Vit hava verið í samband við Gudmund Nielsen, sum hevur gjørt okkum eina serbyggisamtykt fyri nýggju útstykkingina, sum verður send til góðkenningar fyrst í komandi árið. Vit vóna at bíðitíðin eftir at fáa hana góðkenda, ikki verður drúgv. So skjótt sum hon er góðtikin, er klárt at selja grundstykkini. Okkurt av teimum er umbiðið og møguligt er, at skriva seg upp til grundstykkið.

Vit hava sett 3.500.000 mió kr. av til nýggjan kirkjugarð. Tað er ikki tikin endalig avgerð um kirkjugarðin, men arbeiðið er í gongd. Tá vit eru komin longri við arbeiðinum, verður kunning send út til bygdafólkið.

Fíggjarætlanin fyri 2026 bleiv samtykt á fundi 16.11.25. Fríggjarætlanin javnvigar við 39.294.017,00 kr.
Barnafrádrátturin er 6.000 kr., og skatta-prosentið er óbroytt, 20,85%.

Við hesum vil Skopunar Kommuna takka fyri brátt farna árið, og ynskja øllum eitt av Harranum vælsignað nýggjár.

Skopunar Kommuna
Marjun S. Debes
Borgarstjóri